# Ferðslutrygd og nýggjur tunnil norð um fjall

NICOLINA DAHL
Klaksvík



Eg síggi, at tey, ið eru fyri at leggja ein tunnil yvir í Gerðabø, m.a. brúka ferðslutrygd sum grundgeving. Nú er tað so, at talan um ferðslutrygd næstan altíð verður sæð gjøgnum eyguni á teimum, sum koyra bil. Eg tori at pástanda, at bestu ráð um betri ferðslutrygd er at minka privatbilismuna og fáa meira samflutning (kollektiva ferðslu), men tað er ikki nakað, sum fellur í góða jørð at siga hart í Føroyum.

Vit vita ikki nakað ítøkiligt um, hvussu ferðslutrygdin verður, um vit velja eina linjuføring fram um eina aðra. Tað skulu neyvar kanningar av serkønum fólki til tað.

Á heimasíðuni hjá Landsverki, har ferðsluteljingar eru at síggja (seinasta talið er frá 2007), stendur, at 1769 bilar í miðal fóru eftir tunnilsvegnum um dagin. Teir flestu av teimum fara jú ikki yvir í Eysturoynna hvørja ferð, men koma til arbeiðis, til handils ella til lækna og onnur ørindi í Klaksvík og síðan norðaftur. Onkur skal kanska eisini til Haraldsunds ella Kunoyar. Liggur tunnilin í Gerðabø skulu tey fyrst uttanum býin og so øll inn í býin aftur somu leið, sum ferðslan, ið kemur úr Eysturoynni. Tað er longu nógv ferðsla eftir Oyravegnum – Landsverk sigur, at í 2007 koyrdu í miðal 1821 bilar út eftir Oyravegnum og 1824 koyrdu um Norðoyatunnilin um samdøgurði. Er nakað skil í, at leggja meira ferðslu har, ið nógv ferðsla er frammanundan? Næstan allir bilarnir skulu tá trokast oman millum hús eftir Gerðagøtu, sum í ovara enda onga gongubreyt hevur. Har er skúlaøkið, har er ítróttaøkið, har er barnagarður, ja, øll tann bleyta ferðsla, ein kann ímynda sær.

Á Oyravegi eru nógv gongufólk at síggja. Fólk renna heilsurenning. Børn ganga ella súkkla út í Grøv og gomul fólk ganga sær niðan á beinkin uppi á Grundum, har útsýnið er frítt yvir Borðoyavík. Fólk fara út á kirkjugarðin at røkja leiðið hjá sínum kæru. Eftir Oyravegi skulu vit eisini, tá vit fylgja onkrum til teirra seinasta hvíldarstað. Er tað ikki óheppið at leggja eina høvuðsferðsluæðr aftrat har, sum líkfylgi skulu framvið so av og á?

Eg dugi ikki at skilja, at tað skal bøta um ferðslutrygdina at føra hesar bilarnar út í Gerðabø. Tað ljóðar skilabetri fyri ferðslutrygdina at spjaða ferðsluna soleiðis, at bilarnir, sum koma norðanifrá koma inn norðantil í býnum, haðani tríggir vegir eru gjøgnum býin, meðan bilarnir úr Norðoyatunlinum koma inn í býin sunnaru megin frá og verða spjaddir út á báðar armar. Við einum tunli í Gerðabø koma tey í Haraldsundi og Kunoy harafturat at vera avskorin.

Sjálv haldi eg, at størsti trupulleikin fyri ferðsluna í Klaksvík í løtuni eru parkeringsviðurskiftini – tað standa bilar fram við vegnum alla staðni og forða fyri, at ferðslan glíður. Tað varð ikki lagt upp fyri, tá bygt var, at fleiri bilar nú eru í hvørjum húsi.

Men omanfyri alt hetta við ferðsluni stendur, at vit eftir mínum tykki kunnu ikki loyva okkum at fara ígjøgnum søguligt øki sum Gerðabø. Toftirnar har eru mær vitandi friðaðar. Har mugu friðingarmyndugleikar uppí at verja, at tær ikki verða skamfílaðar. Og síðan skulu ivaleyst aftur fornfrøðiliga rannsóknir til – og tær eru ikki løtuverk.

Tað kennist ómetaliga órættvíst, at uttanbíggja fólk skulu kunna gera av, hvussu okkara nærumhvørvi skal síggja út!

Latið Gerðabø fáa frið!

# Nútíðar samfelag eftir slupptíðar fyrimynd

HELGI ABRAHAMSEN



Fyri umleið 200 árum síðani vóru bygdir sum Hvalba og Sandur millum størstu bygdir í Føroyum. 100 ár seinni vóru Fuglafjørður, Klaksvík, og aðrar slupp-háborgir tær størstu bygdirnar. Í dag er Havnin nógv tað størsta plássið í landinum og Runavík (og bygdir/býir har um vegir), sum vóru mestsum manntómar fyri 100 árum síðani, teljast eisini millum størstu plássini. Men hvat er tað sum hendir við okkara bústaðarmynstri?

**Livilíkindini avgerandi**
Fyri 200 árum síðani vóru Føroyar eitt bóndasamfelag, og tí var natúrligt, at fólk fluttu til tær bygdirnar, har landbúnaðurin hevði bestu gróðrarlíkindini. Seinni kom slupptíðin, og tá blómaðu bygdir, har millum annað atløguviðurskiftini vóru góð.

Fólkið flutti til støð, har arbeiði var at fáa og har livilíkindini annars vóru tey bestu. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað eisini at verða í framtíðini.

**Tíðir broytast**
Slupptíðin og bóndasamfelagið eru farnar tíðir, og nú eru heilt onnur viðurskifti avgerandi fyri, hvar fólk velja at búsetast. Jørð og náttúruhavnir hava ikki so nógv at týða longur, og fólk trunka seg saman á stórplássum. Men onkursvegna hava vit ilt við at sleppa teimum farnu tíðunum, og berjast tí við hond og føt ímóti hesi natúrligu fólkaflyting.

**Framtíðar bústaðarmynstrið**
Eg ivist ikki í, at nógv tann størsti parturin av føroyingum í framtíðini fer at búgva í økinum Tórshavn, Skálafjørður og Klaksvík (og sjálvandi eisini í bygdunum sum liggja uppat hesum økinum), og her verður Skálafjarðartunnilin ein týðandi partur. Hetta fer at henda, líkamikið hvussu ofta vit brúka orðini miðspjaðing, útjaðarastuðul og bygdamenning. Fólk vilja búgva tættari saman, og hesi gongdini kunnu vit ikki forða fyri við politiskum tiltøkum – og hví skuldu vit tað?

Sjálvandi er tað harmiligt, hvørja ferð ein smábygd doyr út. Tað munnu øll vera samd um. Men hava vit nakað val?

**Liva ikki av hugna**
Øll munnu vera samd um, at ein vissur hugni er í sluppum, torvskurði og ullararbeiði. Men tann sum sjálvur hevur livað í teirri tíðini, ynskir hana neyvan aftur, tí tað var ikki serliga liviligt. Føroyingar høvdu ikki kunnað staðið einsamallir eftir við vaðbeinið í 2009, meðan aðrar tjóðir fylgdu tøkniligu menningini.

Soleiðis verður eisini við smábygdunum. Nútíðar ungdómur krevur meira enn tað, tær hava at bjóða, sjálvt um tær eru sera hugnaligar.

**Mugu fylgja tíðini**
Vit stríðast í løtuni um politivaktir, læknavaktir, samferðsluútbyggingar, orkuspurningar o.s.fr. Hetta gera vit, tí vit búgva so spjatt, og vit hava ikki ráð at veita tær tænastur, sum eru neyðugar. Bústaðarmynstrið frá bóndasamfelagnum og slupptíðini hóskar ikki til nútíðina. Vegastrekkini eru dupult so long, sum tey áttu at verið. Vit brúka í tonsavís av brennievni, fyri at flyta okkum aftur og fram eftir hesum longu vegunum. Vit fáa illa brúkt fjarhita, tí rør skulu leggjast til hvørt einstakt hús, og húsini standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum.

Tað er tí sera umráðandi, at vit hava hetta í huga, tá framtíðar íløgur verða gjørdar. Vit hava ikki ráð til at liva í einum nútímans samfelag, sum er samansett eftir slupptíðar fyrimynd.

# Tað svarta lambið

EIVIND WEYHE



Føroyingar hava ein merkiligan vana altíð at loypa á leistum, tá ið onkur útlendskur serfrøðingur kemur higar at borðreiða við sínari serfrøði. Alt í einum síggja teir ljósið, næstan sum Paulus á sinni.

Í Vikuskiftis-Sosialinum stendur at lesa, at ein danskur serfrøðingur hevur verið her og "smuglað tað svarta lambið í bókmentum" inn á Føroyamálsdeildina. Sum skilst, eru tað krimibókmentir, sum eru tað svarta lambið.

Ikki skuldi verið neyðugt hjá einum útlendskum serfrøðingi at smugla nakað lamb inn á Føroyamálsdeildina. Tí í 2006 skrivaði Marna Jakobsen, cand. phil., høvuðsritgerð á Føroyamálsdeildini um krimibókmentir. Hon helt fyrilestur á deildini um evnið í 2006, og í Varðanum bd. 73, sum kom hetta sama árið, varð hesin fyrilestur prentaður. So heilt nýtt er tað ikki, at hatta lambið hevur ligið á biti á Fróðskaparsetrinum, um enn tað kanska ikki hevur verið hagfast.

Men kanska hevur lambið havt ilt við at hagfestast, tí í handbókini "Hugtøk í bókmentafrøði" verða krimisøgur lýstar sum "Slag av lættisoppabókmentum, har alskyns brotsverk, verða lýst, morð, njósning, smugling o.a., men lítið verður gjørt við orsøkirnar til brotsverkini, sálarlívið hjá brotsmanninum ella samfelagsligu umstøður hansara."

Kanska er lambið beitt av haga.

# Soffi heldur fram sum forkvinna

**Á aðalfundi í Sinnisbata í gjárkvøldið vóru nýggir nevndarlimir valdir, men formaðurin heldur fram**

Soffi Egholm verður verandi forkvinna í Sinnisbata.

Tað er greitt eftir aðalfund felagsins í Miðlahúsinum í gjárkvøldið.

Á aðalfundinum stóðu tríggir nevndarlimir fyri vali og teir vóru Soffi Egholm, Svenning á Lofti og Ásla Poulsen.

Men harafturat segði Æna Reinert seg úr nevndini og sostatt skuldi fýra nevndarlimir veljast á aðalfundinum.

Soffi Egholm, Svenning á Lofti og Ásla Poulsen vórðu øll afturvald, men nývald í nevndina var Lív Egholm.

Tiltakslimir eru Margretha Poulsen og Joan Johannesen.

Annars sita Niels Hammer, Ankey Nattestad og Regin Jóanesarson í nevndini í Sinnisbata.

Beint eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við Soffi Egholm, sum formanni, Áslu Poulsen sum næstformanni, Svenninginum av Lofti sum kassameistara og Lív Egholm sum skrivara.

-áki-



*Her er nývalda nevndin í Sinnisbata avmyndað í vælkendu trappuni í Miðlahúsinum. Fremst sita Lív Egholm, vinstrumegin, og Ásla Poulsen. Vinstrumegin í miðjuni situr Regin Jóanesarson, í miðjuni er tað Joan Johannesen og høgrumegin situr Niels Hammer. Aftast eru tað Soffi Egholm, vinstrumegin og Svenning av Lofti. Margretha Poulsen og Ankey Nattestad eru ikki við á myndini*